# Fróði var vónbrotin

**A-LANDSLIÐIÐ**

**Føroyski liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, var bæði vónbrotin av málinum, serbar komu á odda við, og at tað ikki eydnaðist Føroyum at fáa eitt mál og kanska koma innaftur í dystin fríggjakvøldið**




*– Fyrsta málið hjá teimum kann róliga kallast tjóvarí, og tað skelkaði okkum eitt sindur, segði føroyski liðformaðurin, Fróði Benjaminsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hilmar Jan Hansen

– Eg eri nokk so vónbrotin, tí eg hevði hopað, at vit fingu eitt gott úrslit, og tá meini eg við ein javnleik ella meira, segði føroyski liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, eftir 0-3 ósigurin ímóti Serbia fríggjakvøldið.

Hetta var dystur nummar 61 hjá Fróða, og í seinna hálvleiki var hann nær við at skora sítt fjórða landsliðsmál.

– Ja, vit vóru eitt sindur óheppnir, at vit ikki fingu eitt mál, sum hevði fingið okkum innaftur í dystin, men eg rakti tíverri ikki bóltin. Tá Símun leggur innfyri, veit eg nøkulunda, hvar bólturin plagar at koma, men eg rakti hann so ikki, og eg haldi, at onkur aftan fyri meg eisini var nær við, segði Fróði.

Eins og øll vit onnur, var hann eisini rættiliga harmur um mátan, Serbia kom á odda uppá:

– Fyrsta málið hjá teimum kann róliga kallast tjóvarí, og tað skelkaði okkum eitt sindur. Eg haldi, at tað er heilt ótrúligt, at hvørki dómari ella linjudómari síggja tað, men nú er tað heldur ikki so ofta, at fyrimunirnir eru við okkum í dømingini.

### Á rættari leið

– So fingu teir eitt mál aftrat, tá vit ikki vóru konsentreraðir, og tí bleiv tað trupult. Men í seinna hálvleiki haldi eg, at vit vóru nógv betri við og fingu trýst teir, segði hann.

– Eg haldi, at vit nógvar teir síðstu dystirnar hava víst, at vit eru á rættari leið, tá tað snýr seg um spælið. Kjansirnar fáa vit eisini, so vit mugu bara fáa sett nakrar av teimum inn, tí so eru vit nógv betur við.

Av føroysku spælarunum var Fróði Benjaminsen veruliga tann, ið gekk undan á føroyska miðvøllinum allan dystin – eisini í fyrra hálvleiki, tá tað annars ikki var nógv veiggj í føroyska spælinum. Men sjálvur vildi hann ikki gera so nógv burtur úr sínum egna innsatsi.

– Eg veit ikki, um hetta er ein av mínum frægastu dystunum, men eg haldi, at tað kann altíð verða betri. Nøgdur eri eg ongantíð, tí eg haldi altíð, at har er okkurt, ið kann gerast betri, staðfesti liðformaðurin eftir dystin fríggjakvøldið.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Antic væl nøgdur

**A-LANDSLIÐIÐ Serbiski venjarin, ið mátti síggja dystin frá áskoðaraplássunum, tí hann hevði karantenu, var væl nøgdur við at vinna 3-0**

Hilmar Jan Hansen

Hóast hann royndi at smoyggja sær út í bussin eftir dystin, uttan at fjølmiðlarnir skuldu leggja hann til merkis, eydnaðist at fáa orðið á serbiska landsliðsvenjaran, Radomir Antic, meðan hann vinarliga skrivaði børnum autografar uttan fyri FSF-húsið.

– Vit fingu eitt skjótt mál og komu stutt eftir eisini upp á 2-0, og annars haldi eg, at vit høvdu gott tamarhald á spælinum. Í seinna hálvleiki høvdu vit einar tveir ella tríggjar góðar møguleikar, ið áttu at givið mál, men kortini eri eg nøgdur við sigurin, segði Antic.

– Sjálvandi kunnu vit spæla betur, enn vit gjørdu hesa ferð, men 3-0 á útivølli er altíð ein góð byrjan í einari EM-undankapping, so eg eri væl nøgdur.

Radomir Antic noyddist at síggja dystin frá áskoðaraplássunum, tí í kjalarvørrinum á HM-endaspælinum í Suðurafrika í summar fekk hann karantenu í fýra landsdystir, eftir at hann hevði verið í so opinskáraður um avrikið hjá dómaranum Jorge Lorrionda úr Uruguay, eftir at Serbia tapti 1-2 fyri Australia.

Ein onnur avleiðing av hesum er, at Antic er gingin við til at fara niður í hálva løn sum landsliðsvenjari, tí gjørdi hann ikki tað, hevði serbiska fótbóltssambandið givið honum sekkin fyri longu karantenuna, ið ger, at hjálparvenjari hansara, Resad Kunovac, hesar dystirnar má avgreiða alt tað, sum skal gerast undir dysti.

Hesi viðurskifti tosaðu vit ikki við Radomir Antic um fríggjakvøldið, tí hann vildi bert gera viðmerkingar til sjálvan dystin. Og nú hann hevði sæð sínar menn »við hepnari hond« tikið tey væntaðu trý stigini, hevði hann rósur at bera føroyingunum:

– Føroyar hava eitt ungt og kanska ikki so roynt lið, men teir hava tíðina fyri sær, so tit kunnu vænta tykkum eitt sindur av hesum liðnum, segði Antic, áðrenn hann skundaði sær í spælarabussin, ið koyrdi vestur á flogvøllin beint eftir dystin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Tápuligt mál oyðilegði veitsluna

**U21-LANDSLIÐIÐ Tað var leingi líkt til, at føroyska U21-landsliðið skuldi fáa eitt stig burtur úr útidystinum móti Moldova. Men eitt tápuligt mál tryggjaði heimaliðnum øll stigini**

Uni Holm Johannesen

Føroyar høvdu møguleikan at enda á triðja plássinum í bólkaspælinum.

Men liðið rakk fimta plássinum í røðini av seks liðum.

Orsøkin var eitt tápuligt mál, sum Moldova fekk, tá lítil løta restaði í av dystinum móti Føroyum.

Tað er greiða niðurstøðan hjá Jóan Paula Dahl Jakobsen, sum var liðskipari hjá føroyska liðnum.

– Stríðshugurin var aftur fyrimyndarligur. Vit vóru undir trýsti í seinna hálvleiki, men tað var um reppið, at vit hóraðu undan. Men so fær ein mótstøðumaður ov nógv pláss í brotsteiginum aftaná hornaspark, greiðir málverjin frá.

Føroyska U21-landsliðið hevur staðið seg sera væl í hesari undankappingini. Liðið hevur vunnið 11 stig, og tað er føroyskt met.

Høgni Eysturoy spældi sín fyrsta dyst á U21-landsliðnum um vikuskiftið. Hann røkti plássið sum bakkur í høgru. Odmar Færø, sum oftast er á beinkinum, var á miðvøllinum, og báðir stóðu seg væl, sambært Jóan Paula Dahl Jakobsen.

– Tað hava verið fleiri broytingar á liðnum, men tað tykist ikki ávirka stórvegis. Tað sigur ikki lítið um støðið á heildini, og um hugburðin hjá leikarunum, sigur hann.

Finnur Justinussen, Víkingur, varð rikin av vølli, tá seks minuttir vóru eftir av dystinum. Hann fekk sítt seinna gula kort.

Artur Ionita skoraði einasta málið í dystinum í Moldova.

*uni@sosialurin.fo*

**Føroyska liðið:** Jóan Pauli Dahl Jakobsen, B36 – Høgni Eysturoy, B36, Rógvi Baldvinsson, Algård, Dánjal Davidsen, EB/Streymur, Viljormur Davidsen, OB – Finnur Justinussen, Víkingur, Hallur Hansson, Aberdeen FC, Kristoffur Jakobsen, EB/Streymur (Heri Hansen Nesá, Århus Fremad, 77.), Odmær Færø, B36 (Karl Løkin, 62.), Rógvi Poulsen, HB – Páll Klettskarð, Víkingur (Øssur Dalbúð, ÍF, 55.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Hans Jørgensen, 07 Vestur, Jens Joensen, NSÍ, Erling Jacobsen, Víkingur
og Dánjal á Lakjuni, ÍF.
Gult kort: Finnur Justinussen og Kristoffur Jakobsen
Reytt kort: Finnur Justinussen, tvey gul
Venjarar: Heðin Askham og Bill M. Jacobsen

# Atli Danielsen givin á landsliðnum

**FÓTBÓLTUR Atli Danielsen hevur takkað fyri seg á landsliðnum fyribils**



Uni Holm Johannesen

Atli Danielsen fer ikki at spæla á føroyska fótbóltslandsliðnum komandi seks mánaðirnar.

Miðvallarin, sum er knýttur at hópinum hjá FC Roskilde, hevur boðað Brian Kerr, landsliðsvenjara, frá, at hann er ikki tøkur, tí hann er upptikin av lesnaðinum í Danmark.

– Lesnaðurin er tíðarkrevjandi í løtuni, og eg seti meg ikki føran fyri at brúka nógva tíð upp á landsliðsfótbólt samstundis. Men um eitt hálvt ár er støðan øðrvísi, og tá havi eg aftur tíð, sigur Atli Danielsen.

Tí er talan ikki um eitt endaligt farvæl við landsliðsfótbólt.

*uni@sosialurin.fo*